# Í kaldari skýming á havnarlagnum

**Tað regnar, og kuldin liggur tráur norður av kavaklæddu fjøllunm fyri sunnan. Bátarnir, sum dagliga rógva út, fáa framvegis fisk á Norðhavinum. Mánadagin fekk onkur, sum legði upp á Eiði, oman fyri tonsið**

ÚTRÓÐUR
*Edvard Joensen*



*Fiskurin verður lagdur upp á Eiði og fluttur við lastbili út á Toftir, har hann verður seldur á uppboðssølu*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Eiði:** Bátarnir eru enn fleiri í tali, og teir fáa framvegis eitt sindur við snelluni norðanfyri.

Hóast tað nú fer at líða eitt sindur, er framvegis nógv ferðsla í havnini á Eiði. Bátarnir eru umleið líka nógvir í tali, sum tá teir vóru flestir um grækarismessuleitið. Og teir fáa framvegis fisk, láta teir at.

Hann lotar lágt, nú tað skýmir mánakvøldið á Eiði. Lotið er rættiliga kalt, og eitt sindur kennist úr tí. Vátaslettingur helst. Kavin liggur enn á fjøllunum, og í skýmingini kennist tað lítið várligt at standa her á bryggjukantinum, meðan menninir í bátinum krøkja í, og kranaførarin hivar netini við fiski upp í grønu kassarnar, sum standa á bryggjuni.

Ein føroysku seksæringur við trimum monum glíður undan stevninum á Morgunstjørnuni, sum liggur við bryggjuna. Hon er komin undan Íslandi og skal landa í morgin. Helst í Miðvági, heldur onkur, sum er á bryggjuni.

Seksæringurin leggur at undir krananum, og hivar tvey net við umleið 1.000 pundum upp á land. Maðurin á bryggjuni loysir posaknútin, og fiskurin rennur niður í grøna karið. Tá bæði netini eru tømd, er karið fult. Eitt sindur av ísi er lagt á botnin, og nakrir spakar verða tveittir omaná. Eitt frámerki verður sett á kassan og báturin hevur givið pláss fyri tí næsta, sum kemur fram at at landa.

Longur frammi liggur ein 60 tonsari, sum rør við línu. Teir hava gjørt tað hampiligt í vár. Tað plaga teir, hóast teir ikki altíð hava so góðan hug at láta væl at. Men tað er ikki tann, sum altíð avreiðir í Útvarpinum, sum hevur frægasta úrslitið, tá uppgjørt verður, plaga teir at halda.

Eitt tíggjumannafar kemur fram við síðuni og leggur stilt. Tað er gággufiskarin, sum kemur við agni. Sunnan úr Eysturoynni. Plagar at royna í Tangafirði, so tað er langur vegur at sigla hjá honum. Hann plagar annars at koyra gágguna norður við bili.

Hann hevur fingið bara væl í dag, so útróðrarformaðurin, sum tekur ímóti, letur væl at. Gott agn er, sigur hann.

Bátarnir úti í havnini gerast fleiri og fleiri. Teir bíða eftir landingartørni. Í kvøld er bara ein lastbilur og tekur ímóti. Hinir eru til arbeiðis aðrastaðni, men plaga at koma, so skjótt teir annars eru leysir.

Eitt sindur ymiskt er, hvussu tað roynist hjá bátunum. Onkur hevur bara eini 300 pund, meðan onkur annar fer upp um tonsið. Nógvir liggja hvørju megin við tað hálva tonsið kortini. Og tað er ikki so heilt galið, tí í nógvum bátum eru bara ein ella kanska tveir mans.

Teir, sum taka ímóti, siga, at higatil í kvøld hava teir fylt upp í eini 80 kør, sum verða koyrd út á Toftir, har alt verður selt á uppboðssøluni hjá Fiskamarknaðinum.

Eitt sindur er nú útliðið, og rognini eru ikki so góð, sum tey hava verið fyrr í vár. Heldur ikki verður tikið í móti silum meira.

Og hóast prísurin á fiskinum eisini er lækkandi í løtuni, kunnu eini 1.000 pund kortini geva einum einsamøllum manni eina hampiliga dagløn.

Tað vætir nú rættiliga niður úr luftini. Bátarnir hvørva, so hvørt teir hava lagt upp. Maðurin á bryggjuni skrivar navn og nummar á bátinum á ein merkiseðil, sum verður heftur á grøna kassan, og tann næsti báturin leggur at landingarplássinum.

Summir skunda sær út úr havnini og suður eftir Sundalagnum. Men teir flestu fara eystur at flótibrúnni Suðuri undir Gerði og leggja seg.

Suðringarnir eru her enn. Teir siga, at onkur var farin suður um aftur, men kom aftur, tí tað royndist vist hóast alt frægari norðanfyri.

Tað regnar. Droparnir falla tungir og legja seg á linsuna á fototólinum, samstundis sum tað myrkir, so ikki fæst líkinda mynd uttan við blitsi. Men tað røkkur so stutt, so tað kann næstan gera tað sama, sum líkindi nú eru. Og hetta skal eisini skrivast inn á telduna og sendast um Internetið til blaðhúsið á Argjum, so frægast er helst at fara at húsum, meðan enn ein bátur kemur inn um grótkastið og leggur seg í bíðirøðina inni í hylinum.



*Gággufiskarin er komin við agni til línubatin, sum rør út norðanfyri*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Alt er eftir avtalu við Høgna Joensen

**–Tað er ikki rætt, at Høgni Joensen er sagdur upp, men eftir avtalu við hann sjálvan, er hann fluttur í annað starv, tí aðalstjóri kann hann ikki vera longur, sigur Sámal Petur í Grund**

UMSKIPING
*Áki Bertholdsen*

– Tað er ein misskiljing, tá ið sagt verður, at Høgni Joensen skal sigast upp sum aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum.

Tað sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

– Hinvegin er tað er rætt, at hann skal halda uppat sum aðalstjóri. Men tá ið hann er tað, verður hann fluttur í annað starv.

Landsstýrismaðurin heldur, at málið, sum hevur tikið seg upp um aðalstjóran í almanna- og heilsumálastýrinum, er eitt sindur misskilt.

– Alt, sum er farið fram, er eftir avtalu ímillum meg og Høgna Joenen, sigur Sámal Petur í Grund.

Hann sigur, at eftir hansara tykki er tað neyðugt at fáa ein nýggjan aðalstjóra í Almanna- og heilsumálastýrinum

– Stýrið virkar ikki. Starvsfólkadeildin og lønardeildin virka hampiliga væl, men fyristingarliga deildin er rættiliga illa fyri og hevur ongantíð fingist at virka.

– Høgni Joensen hevur formligu ábyrgdina av stýrinum, men vit mugu staðfesta, at tað hevur ikki eydnast honum at fáa viðurskiftini í rættlag. Tí haldi eg, at tað er neyðugt at royna nýtt fólk.

Sámal Petur í Grund sigur, at hetta hevur hann boðað Høgna Joensen frá.

– Men tað hevur ongantíð verið ætlanin at siga hann upp, soleiðis, sum fatanin hevur verið. Eftir avtalu við Høgna Joensen hevur ætlanin alla tíðina verið at flyta hann í eitt annað starv.

– Eftir avtalu millum Høgna og meg, verður hann »kommiteraður«, sum tað eitur á fakmáli. Tvs, at hann fær serligar uppgávur. Almanna- og heilsumálastýrið hevur nógvar, veldugar uppgávur og Høgni Joensen hevur drúgvar royndir. Tað, sum hetta snýr seg um, er at fáa sum mest burturúr honum. Tað ítøkiliga innihaldið í starvinum skal Høgni Joensen sjálvur vera við til at forma, saman við landsstýrismanninum.

– Høgni Joensen segði í samrøðu við Sosialin í gjár, at hann visti onki um alt hetta. Tað einasta, hann visti, var, at tú hevði boðað honum frá, at tú vildi hava ein annan aðalstjóra?

– Hetta er ikki rætt. Eg boðaði honum frá avgerð míni mikudagin, og allan hósdagin arbeiddu Høgni Joensen og eg við spurninginum um, hvussu starvsbroytingin kundi fremjast í verki í samsvari við tey rættindi, hann hevur. Og í samráð við hann eru vit síðani komin fram til, hvussu tað skal gerast, og undir hvørjum treytum starvið hjá honum skal umskipast. Tað, sum vit eru samdir um, er ein loysn, sum báðir partar væl og virðiliga kundu góðataka. Tað hevur ikki verið nøkur ósemja um tað. Men tað ítøkliga innihaldið í starvinum ber ikki til at siga nakað um enn, tí tað skal leggjast fast í samráði ímillum Høgna Joensen og landstýrismannin.

Høgni Joensen heldur eisini, at løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir, hevur havt ein leiklut í avgerðini um at koyra hann frá sum aðalstjóra. Sambært honum, hevur Løgmansstjórin alla tíðina roynt at fáa hann frá.

– Tað er púra burturvið. Avgerðin um at nýggjur aðalstjóri skal setast, er mín og bara mín. Men tað er púra greitt, at aðalstjórin á Løgmansskrivstovuni er við í arbeiðnum at avgreiða málið formliga, tí Løgmaður er setanarmyndugleiki, saman við landsstýrinum, sigur Sámal Petur í Grund.



*– Tað er full semja ímillum meg og Høgna Joensen, at hann fer frá sum aðalstjóri og verður fluttur í annað starv. Vit hava funnið eina loysn, sum báðir partar kunnu væl og virðiliga kunnu góðtaka, sigur Sámal Petur í Grund*

# Ongin avtala við Sámal Petur í Grund

**– Eg hevði sjálvandi ikki funnið uppá at gjørt nakra avtalu við Sámal Petur í Grund um eitt nýtt starv, fyrrenn eg veit, hvat hetta er fyri eitt starv. Og tað veit eg púra onki um enn, sigur Høgni Joensen**

UMSKIPING
*Áki Bertholdsen*

– Tað passar ikki, at Sámal Petur í Grund og eg hava nakra avtalu um at flyta meg í eitt annað starv.

Høgni Joensen, aðalstjóri í Almanna- og Heilsumálastýrinum hevur langt ífrá somu fatan av støðuni, sum hesar seinastu dagarnar hevur tikið seg upp í ovastu leiðsluni í Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Høgni Joensen sigur framvegis, at tað einasta hann veit, er, at ætlanin er at koyra hann frá sum aðalstjóra og at ætlanin samstundis er at bjóða honum eitt nýtt starv.

Hann vísir afturvísir tískil tað, sum Sámal Petur í Grund førir fram í hinari greinini á hesi síðuni um, at tað, sum er hent, er farið fram í fullari semju ímillum partarnar.

– Tað er rætt, at Sámal Petur í Grund hevur boðað mær frá, at hann ætlar at fáa ein annan aðalstjóra í Almanna- og Heilsumálastýrið og at eg tískil skal frá. Tað er eisini rætt at hann hevur boðað mær frá, at hann ætlar at bjóða mær eitt annað starv.

– Men tað er eitt langt lop haðani frá og til at siga, at vit hava eina avtalu, tí tað passar ikki, sigur Høgni Joensen.

– Tað er heldur ikki rætt, at vit hava tosað saman tað mesta av hósdegnum. Eg sá ikki landsstýrismannin, fyrrenn umleið klokkan 15 hósdagin. Hetta kann prógvast, tí hósdagin høvdu vit tríggjar fundir, sum fóru við tí mesta av degnum, so tað er avmarkað, hvør tíð hevur verið til at tosa um starvsviðurskiftini.

Høgni Joensen sigur, at tað einasta, sum er hent, er, at Sámal Petur í Grund hevur bjóðað honum eitt annað starv, nú ætlanin er at koyra hann frá sum aðalstjóra.

– Eg bað hann koma við einum ítøkiligum tilboði, tí fyrrenn eg havi fingið tað, kann eg sjálvsagt ikki taka støðu.

– Eg fari sjálvsagt ikki at taka støðu til eitt nýtt starv, fyrrenn eg veit út í æsir, hvat tað ber í sær.

Høgni Joensen vísir til, at tá ið hann søkti sum aðalstjóri, var tað eftir eini lýsing, sum fylti meiri enn eina hálva síðu í bløðunum. Í lýsingini varð starvið nágreiniliga lýst og tí visti hann, hvat starvið bar við sær.

– Skal eg hava eitt annað starv, vil eg eisini hava at vita heilt nágreiniliga, hvat tað ber í sær. Tað ber ikki til at gera munnligar avtalur um slík viðurskifti. Eg gangi útfrá, at reglarnar vera hildnar, og at eg fái eitt ítøkiligt tilboð at taka støðu til.

Høgni Joensen sigur, at Sámal Petur í Grund er sjalvsagt vælkomin at bjóða honum eitt nýtt starv.

– Tað merkir ikki, at eg frammanundan havi játtað at taka við tí. Men fái eg eitt starv, sum eg haldi er betri, enn tað, sum eg havi nú, taki eg sjálvsagt av tí.

– Hinvegin er tað lítið sannlíkt, at eg fari at taka av einum starvi, sum er á einum lægri stigi enn tað, eg nú havi og sum tískil kann metast sum eitt afturstig.

Semjast Sámal Petur í Grund og Høgni Joensen ikki um treytirnar, má aðalstjórin tískil sigast upp. Til tað krevst ein ítøkilig uppsagnargrund. Men Høgni Joensen segði í Sosialinum í gjár, at fekk hann eina uppsagnargrund, sum hann ikki kundi góðtaka, fór hann sjálvsagt víðari við málinum, eisini í rættin, um tað varð neyðugt.



*– Tað passar ikki, at Sámal Petur í Grund og eg hava gjørt semju um, at eg skal flytast í annað starv, sigur Høgni Joensen, ið landsstýrismaðurin ætlar at koyra frá um aðalstjóra í Almanna- og heilsumálastýrinum*